

## Zico illur um dystir mitt á degi

Brasilska fótbóltslegendan Zico, sum nú er venjari hjá japanska landsliðnum, er í øðini inn á fyrireikararnar av HM-endaspælinum í Týsklandi. Orsøkin var, at Japan var noytt at spæla HM-dysti í brennandi hita mitt á degnum. Tað vóru sløk 30 hitastig, tá ið Japan og Kroatia spældu málleysan javnleik í gjár, og Zico heldur, at tað líkist ongum, dystir skulu spælast í so nógvum hita.

– Tað er kriminelt, at vit skulu spæla í slíkum hita aftur. Okkara síðsti dystur var eisini klokkan trý, men fyrireikararnir eru líkaglaðir við hitan. Teir hugsa meira um sjónvarp og forrætning, segði Zico eftir dystin sunnudagin.

## Laudrup ikki upp á tal í Madrid

Sambært valevninum til forsetavalið í Real Madrid, Juan Miguel Villar, er danin Michael Laudrup ikki upp á tal sum venjari í spanska stórfelagnum. Villar sigur við bretska blaðið News of the World, at hann er farin undir samráðingar við Arsenal-venjaran Arsene Wenger og Juventus-venjaran Fabio Capellio.

– Teir eru báðir fantastiskir venjarar, og vit vilja hava tað besta, sigur Villar.

Forsetavalið í Real Madrid verður avgjørt tann 2. juli.

# 2nd Suðuroy International

**Altjóða talvkappingin fylgir Jóansøkuni og tískil verður telvað í Vági ár. Hans Kristian Simonsen fer at royna at verja sigurin í fjør**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*
*carl_eli@hotmail.com*

Manningin er komin uppá pláss, og í ár fara føroyingar væntandi at gera ein vørr eins og í fjør. Tá vann Hans Kristian Simonsen óvæntað kappingina og ognaði sær sín fyrsta og higartil einasta IM-norm. John Rødgaard lá eisini fram við sínum 4. plássi.

2nd Suðuroy International verður telvað í Vági í døgunum 24. juni – 01. juli. Kendasti telvarin úr Vági man vera Thorstein Wilhelm, sáli, sum í mong ár telvaði í Havnar Telvingarfelag. Thorstein luttók somuleiðis í tveimum olympiadum, í 1970 og í 1980. Tá var vágbingurin 72 ár og framvegis millum bestu telvararnar í landinum.




*Tað vakti ans, tá Hans Kristian Simonsen í fjør vann sterku kappingina í Suðuroy. Ein sigur, sum eisini gav Hans Kristiani hansara fyrsta – og higartil einasta – IM-norm*

### Danskur ratingfavorittur

Kappingin í fjør var sterkari. Eitt nú hevur eingin telvari í ár omanfyri 2400 ratingstig. Í fjør høvdu bæði IM John Shaw úr Skotlandi og IM Emil Hermansson úr Svøríki oman fyri 2400.

Men hinvegin er torførari at gita hvør fer at vinna í ár, tí munurin er so lítil millum telvararnar. Undir 100 ratingstig skilja hægst styrkismetta, IM Simon Bekker-Jensen (2393), og 7. styrkismetta telvaran, sum er Hans Kristian (2295). Hetta ger kappingina serliga spennandi og annarleiðis.

Simon Bekker er føddur í 1980 og hevði sítt gjøgnumbrot fyri sløkum 7-8 árum síðani, tá hann vann sær IM-heitið. Síðani hevur hann tó raðfest skúlan hægri enn talv, og er tískil so at siga steðgaður upp. Men hann fer ivaleyst at vera við í oddastríðnum.

Stuttligt at veteranurin IM Bjørn Brinck-Claussen er sloppin í part. Hann er farin væl um tey trýss, men gevur framvegis yngru ættarliðunum góða mótstøðu. Brinckurin er næsthægstur styrkismettur.

Kvinnuligur stórmeistari tekur lut í kappingini, nevniliga Lenka Ptacnikova, ið fyri nøkrum árum síðani fekk íslendskan statsborgararætt.

### Nilssen, Rødgaard og Ziska

Fyriskiparin Rani Nolsøe vónar og væntar, at føroysku umboðini fara at prýðmynda kappingina. Serliga væntar hann sær nógv av nýkosna altjóða meistaranum, John Arna Nilssen, sum hevði góð úrslit á 1. borði fyri Føroyar í talvolympiaduni. John Arni er maður fyri at vinna á stórmeistarum og tí eigur hann als ikki at óttast IM Bekker-Jensen og hinir tittultelvararnar.

John Rødgaard hevði – sum vant – rimmar úrslit í talvolympiaduni. Í 1st Suðuroy International tapti hann einki talv (vann tvey og sjey remis), og í roynd og veru telvar hann kanska sína bestu telving í áratiggir. Rødgaard var tryggur á vinnandi vestmannaliðnum í 1. deild og var álitið hjá Føroyum í OL.

Stjørnuskotið yvir øllum, Helgi Dam Ziska, fer eirindaleyst eftir sína triðja IM-normi í Vági. Helgi hevur stabiliserað seg nøkunlunda á 2300-ratingmarkinum, og nú er kanska høvið hjá honum at vinna sær sín triðja norm síðani seinasta summar. Spennandi verður.

### Outsidararnir

Torført verður hjá Hans Kristiani at endurvinna kappingina, hóast hon er veikari enn tann í fjør. Eitt gott OL-úrslit viskar ikki øll tey mongu sløku úrslitini seinasta árið hjá Hans Kristiani heilt burtur. Góð kappingarbyrjan tykist hvørja ferð vera lykilin til eitt gott úrslit hjá kollfirðinginum.

Helgi og Hans Kristian skulu hava 7 stig av 9 fyri at vinna sær norm, meðan Sjúrður Thorsteinsson skal hava 6,5 stig. Í fjør fekk Sjúrður Thorsteinsson fýra javnleikir. Í ár stílar hann ivaleyst hægri, men sum lægst rataði telvarin, fer Sjúrður at fáa tað sera torført. Møguliga røkkur hann 3 stigum.

**2nd Suðuroy International**

| Nr | | Navn | Land | Rating |
|---|---|---|---|---|
| 1 | IM | Bekker-Jensen, Simon | Danmark | 2393 |
| 2 | IM | Brinck-Clausen, Bjørn | Danmark | 2359 |
| 3 | IM | Nilssen, John-Arni | Føroyar | 2356 |
| 4 | IM | Rødgaard, John | Føroyar | 2344 |
| 5 | | Ziska, Helgi Dam | Føroyar | 2306 |
| 6 | FM | Andreasen, Per | Danmark | 2303 |
| 7 | | Simonsen, Hans Kristian | Føroyar | 2295 |
| 8 | | Salama, Omar | Egyptaland | 2214 |
| 9 | WGM | Ptacnikova, Lenka | Ísland | 2183 |
| 10 | | Thorsteinsson, Sjúrður | Føroyar | 2067 |


# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.